


# Nýggjan frálandsflota til Atlantsmótið

Deil:

Jan Müller

19.02.2015 - 08:13

Oljan.fo

Stóru útbyggingarnar av olju- og gasskeldum á Atlantsmótinum vestan fyri Hetland og arbeiðið annars í Norðsjónum hava fingið eitt av heimsins størstu frálandsreiðaríum, hálendska Vroon til at endurnýggja sín flota av veitingar- og hjálparskipum. Felagið, sum hevur heimstað í Aberdeen, hevur gjørt avtalu við kinverska skipasmiðju um at byggja 22 nýggj skip. Tey fyrstu eru longu komin til Europa og fleiri koma. Hesi skipini skulu avloysa gomul skip av sama slag, fleiri av teimum hava verið í Føroyum seinastu mánaðirnar at skifta manning og keypa ymsar tænastur.

Nýggjasta av hesum skipunum, Vos Glamour kom til Aberdeen nú um dagarnar eftir drúgvu ferðina frá Fujian Shipbuilding Trading í Fuzhou, Kina

VOS Glamour er eitt sokallað 60-m ERRV-FSV (emergency response and rescue vessel/field-support vessel) og tað fyrsta av fýra av hesum slagnum, sum verður bygt til at arbeiða vestan fyri Hetland og í Norðsjónum.